TV Televarpið
Fleiri rásir - einki roks

# Bóndagarðurin – Afrikanska ævintýrið

**Á TV3 mánakvøldið kl. 19.00:**

500.000 danskar skattafríar krónur fara til vinnandi luttakaran í reality-sendirøðini við heitinum "Bóndagarðurin - Afrikanska Ævintýrið". 20 sera ymiskir danir stríðast á einum bóndagarði í Suðurafrika. Korini eru smálig og kappingin um at halda sín sess á bóndagarðinum er hørð. Luttakararnir fáa hvørja viku arbeiðsuppgávur at røkja á bóndagarðinum, hesar verða ásettar av einum leiðari ella bónda. Luttakararnir velja hvørja viku ein luttakara at vera leiðara. Hesin hevur so síðsta orðið, tá avgerðir skulu takast ta vikuna hann situr. Nú 9 partar eru farnir afturum, eru 9 luttakarar eftir á bóndagarðinum og 11 eru koyrdir út. Í seinasta parti ákærdi Kenneth Frank fyri at hava svikið seg og fyri at hava gingið frá eini avtalu, ið varð gjørd millum fýra luttakarar. Kenneth var í øðini og lovaði hevnd yvir svíkjaran, fyrr ella seinni, og kosta, hvat tað vildu. Hesaferð er ætlanini hjá Kennethi, at Frank skal fáa av at vita. Kenneth hevur saman við Winnie gjørt eina lítla samgongu, ið skal royna at fáa Frank úr kappingini. Men hetta gongur ikki júst sum ætlað. Í komandi partinum verður Frank settur at gera eina intima kanning av eini kúgv á garðinum, ið kanska skal kálva. Og fjáltur kemur á mannligu luttakararnar, tí kvinnurnar stinga høvdini saman og tykjast at hava eina greiða og miðvísa ætlan um at fáa menninar út, ein fyri ein. Stríðið um ta hálvu milliónina heldur fram.


*Í seinasta parti var Kenneth í øðini og fór illa við Frank*


*Frank kannar kúnna*

# Fight Club

**Á Kanal 5 mikukvøldið kl. 20.00**


*Ein heimur í upploysn, høvuðspersónurin í Fight Club stríðist við at fáa fastatøku í tilveruna*


*Brad Pitt og Edward Norton í ræðandi spenningsfilminum Fight Club*

Søguna í hesum filmi fáa vit gjøgnum ein ungan mann (Edward Norton), ið hevur eitt gott og vællønt starv. Hóast hetta, so sær hann onga meining í tilveruni, og hann kennir seg einsamallan og tunglyntan. Hetta ávirkar gerandisdagin. Hann hugsar nógv um innrættingina av síni íbúð og harumframt plagar hann at sníkja seg inn í sjálvhjálparbólkar fyri menniskju við ólekjandi sjúkum. Alt broytist, tá hann hittir tann gátufulla Tyler Durden (Brad Pitt). Tyler heldur einki um materialistiska heimin, hann heldur at menniskjað hevur nógv at læra av pínu, ólukkum og ruðuleika. Tyler bjóðar nýggja vini sínum av í bardaga. Ein vinarligan nevaleik, men kortini ein harðligan nevaleik. Hesin harðligi leikur fær teir báðar at kenna seg livandi, og eftir stutta tíð savnast fleiri ungir menn kring Tyler - og burturúr hesi fylking kemur navnið "Fight Club". Hendan fylkingin heldur kortini virksemi sítt loyniligt. Fylkingin verður manna við fleiri ungum vreiðum monnum og Tyler stýrir øllum virkseminum.